tíðindablaðið
sosialurin
Nr. 123 Leygardagur 1. juli 1995 69. árgangur Krónur 7.00

*Fíggjarmálaráðharrin um komandi samráðingarnar við donsku stjórnina:*

# Málið er at steðga flytingini

*– Eg vil gera alt eg eri mentur fyri at fáa donsku stjórnina at skilja støðuna viðvíkjandi fólkaflytingini. Vit eru ein partur av danska ríkinum og tí mugu vit halda sama livsstøði sum danir, sigur hann*

*síða 13*

# Amerada Hess nærkast nú miðlinjuni



*síða 14-15*



*Bretsk hjún:*

# Berjast fyri rætti føroyinga at drepa grind

*síða 6-7*

## NÝGGIR BILAR

**Skrásettir í Føroyum jan.–mai 1995**

| | | | |
|---|---|---|---|
| FORD | 31,39% | DAIHATSU | 1,79% |
| TOYOTA | 20,63% | CITROËN | 6,28% |
| MAZDA | 2,69% | SAAB/POLDA | 0,45% |
| GM | 6,73% | FIAT | 3,14% |
| NISSAN | 7,17% | SUZUKI | 0,45% |
| VOLVO | 1,35% | HYUANDAI | 1,35% |
| VAG | 2,24% | PEUGEOT | 8,97% |
| SUBARU | 0,45% | BMW | 2,69% |
| MITSUBISHI | 0,45% | RENAULT | 0,90% |
| HONDA | 0,90% | | 100% |

Kelda:
Automobilimportøremes Sammenslutning (DK)

RIMMAR BRÚKTBILA ÚTSØLA hjá P/F WENZEL leygard. 1. juli

inum er somuleiðis ein góð ábending

**Seismikkur úr Føroyum til Houston**

Felagið hevur júst hilagt seismikkuppløkur hjá Western frá tí føroyska økinum og hesar verða nú sendar til Houston í Texas. Ein av fremstu serfrøðingunum hjá Amerada Hess í USA er í løtuni við at fyrireika hetta kanningararbeiðið. Hann kemur til Føroya í september, og tá vónar Amerada Hess at kunna siga okkurt ítøkiligt um tulkingina av seismikkinum og hvørjar ætlanir felagið hevur í sambandi við víðari kanningar í Føroyum. Fyritøkan hevur í løtuni neyvt samstarv við universitetið í Cambridge. Teir fara í felag at finna fram til, hvørjar víðari kanningar talan verður um at gera á føroyskum øki kanska longu í næsta ár.

**120 boringar - bert 7 fund**

Enn hevur so eingin boring verið í føroyskum umráði. Til sammetingar kann sigast, at tað síðani 1974 eru gjørdar 120 boringar vestan fyri Hetland. Av hesum 120 hava bert verið 7 olju- og gassfund. Hetta sigur einum nakað um, hvat vit kunnu vænta okkum í føroyskum øki.

Oljuserfrøðingar halda tó, at royndirnar vestan fyri Hetland kunnu fara at lætta munandi um kanningarnar á føroyskum øki.

M.a. verður mett, at løgini, sum oljukeldurnar Foinaven, Schiehallion og Conival liggja í, helst halda fram føroysku megin Hetlandsrennuna, og at tað er her bestu møguleikarnir eru at finna olju. Hetta tykjast eisini seismisku kanningarnar hjá Western at benda á.

Á høvuðsskrivstovuni hjá Amerada Hess í London eru teir sera spentir at fara í gongd í teimum nýggju økjunum felagið júst hevur fingið loyvi frá bretsku stjórnini.

Vónirnar at finna nýggjar oljukeldur eystan fyri Hetlandsrennuna, nú oljuleitingin fer at taka dyk á seg aftur, eru stórar.

**Gass har norðuri**

Men hvat viðvíkur økjunum longur norðuri, so meta serfrøðingarnir tað vera mest sannlíkt at finna gass har. (Sí kort) Her fann oljufelagið Texaco fyri nøgvum árum síðani ein rættiliga stóra gasskeldu, Victory.

Skal tað løna seg at gera íløgur í gassleiðingar á hesum stóru dýpunum, má talan vera um ovurstórar nøgdir av gassi. Ein møguleiki er at binda gassleiðingar frá økinum vestan í tær gassleiðingar, sum longu eru í Norðsjónum.

Og aftur her kemur so spurningurin, hvat kann fáast burtur úr møguligum gassi á føroyskum øki har norðuri við Hetlandsrennuna. Her kann rørleiðing í bretskum øki koma væl við. Annar møguleiki er so at føra gassið til lands í Føroyum, men eisini tað krevur stórar nøgdir.

Hetta eru nakrir av teimum spurningum, sum serfrøðingar hjá Amerada Hess bóru upp á mál, tá umboð fyri føroyska pressu vitjaðu í London í farnu viku.



Mike King vm. kanningarleiðari fyri alt økið vestan fyri Hetland og Richard Hardmann, kanningarstjóri fyri Europa her í hølunum hjá Amerada Hess í London. Mynd jan




Eitt av kortunum hjá Amerada Hess, sum vísir økini vestan fyri Hetland, sum kunnu goyma olju og gass. Gráu økini er tey, sum Amerada Hess hevur kanningarloyvi.



Horisontal boring fer at hava kollveltandi týdning fyri møguleikarnar at menna eina oljuvinnu millum Føroyar og Hetland

*Orð og myndir Jan Müller*

Sosialurin fer í næstu viku at hava reportasju frá vitjan í Newcastle, har teir eru við at leggja seinastu hond á eitt oljuskip av sama slag sum tey, ið helst fara at síggjast á leiðunum millum Føroyar og Hetland í framtíðini. Tað eru oljuskip av hesum slag, sum í framtíðini fara av avloysa oljupallarnar.

jan





**COBRA**
**typa 149**
Borar og slær, bensin motor, vekt 24 kg
Fæst eisini til leigu
**Kaj Andreasen Pf.**
Kingran 5 · Hoyvík · Tlf. 15600

# Skrivstovustarv

Á dómaraskrivstovuni er eitt starv sum avloysari fyri skrivstovufólk í farloyvi leyst at søkja til setan tann 9. august 1995.

Arbeiðstíðin er 38 tímar um vikuna.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum HK og fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við avritum av prógvum og møguligum viðmælum verða at senda Sorinskrivaranum, postrúm 28, 110 Tórshavn, áðrenn hin 15. juli 1995.

**Sorinskrivarin í Føroyum,**
*hin 27. juni 1995*
**Joen H. Andreasen**

# Hús til leigu

Helvt av nýggjum Norðsetur tvíhúsum í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi við enda á blindvegi í eysturbýnum til leigu frá uml. 1. august, møguliga partvis møblerað eftir avtalu. 3 kømur eru í húsinum. Vinarligast skriva til: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn, viðmerkt

**Bill. mrk. 2003**